**Jacob Vestergaard**
**vegna Fólkaflokkin**

**Løgtingsmál nr. 101/2015: Uppskot til løgtingslóg um føroyskan kortmyndugleika**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um føroyskan kortmyndugleika**

**§ 1.** Umhvørvisstovan er føroyskur kortmyndugleiki.

**§ 2.** Kortmyndugleikin stendur fyri geodetiskum uppmátingum, og topografiskari kortlegging av Føroyum. Harafturat stendur kortmyndugleikin fyri loftmyndatøku og ger lendismodell og myndakort av Føroyum.
*Stk. 2.* Kortmyndugleikin hevur ábyrgdina av elektroniskari miðlan av landafrøðiligum upplýsingum viðvíkjandi Føroyum.
*Stk. 3.* Kortmyndugleikin kann standa fyri ella fremja geodetiska gransking.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áleggja kortmyndugleikanum at standa fyri øðrum uppmátingum, og kortleggingaruppgávum enn teim í stk. 1-3 nevndu.

**§ 3.** Kortmyndugleikin skrásetir staðsettar upplýsingar, harundir staðanøvn, sambært galdandi fyriskipanum.

**§ 4.** Til tess at fremja uppgávur eftir hesi lóg hava starvsfólk hjá kortmyndugleikanum uttan rættarúrskurð atgongd til eitt og hvørt stað og ein og hvønn eigindóm.

**§ 5.** Landsfevnandi topografisk kort av Føroyum, lendismodell og myndakort, skulu vera atkomulig hjá almenninginum.
*Stk. 2.* Fyri annað korttilfar enn í stk. 1 nevnda, kann kortmyndugleikin krevja gjald.

**§ 6.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.
*Stk. 2.* Samstundis verða sett úr gildi "Lov nr. 82 af 31. marts 1928 om Geodætisk Institut, Bekendtgørelse fra 6. april 1831 om forbud mod at efterstikke generalstabskort, Bekendtgørelse nr. 193 af 25. juni 1928: Reglement for Opmaaling ved Udskiftning paa Færøerne".

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Endamálið við lógaruppskotinum er at staðfesta, at ein føroyskur kortmyndugleiki skal skipast. Somuleiðis er endamálið at gera topografisk kort, lendismodell og myndakort ókeypis og atkomulig hjá almenninginum. Lógaruppskotið fevnir ikki um sjókort.

Kortframleiðslan er nógv broytt tey seinastu 20-30 árini. Áður vórðu kort einamest framleidd sum pappírskort, meðan øll nútímans kort eru digital. Harvið hevur sjálvt tað staðsetta grundarlagið handan kortini (geodata) fingið týdning fyri onnur enn sjálvan kortframleiðaran. Avbjóðingin hjá tí føroyska kortmyndugleikanum verður tí at lyfta føroyakortið burtur úr fortíðini við pappírskortum og inn í ta digitalu nútíðina.

Tann føroyski kortmyndugleikin fær sum uppgávu at framleiða og viðlíkahalda tað almenna føroyakortið, at skráseta staðanøvn, at gera lendismodell og at framleiða myndakort. Harafturat hevur kortmyndugleikin ábyrgdina av føroysku geodesi'ini, sum er sjálvt grundarlagið undir øllum uppmátingum í Føroyum. Ein fortreyt fyri einum vælvirkandi føroyskum kortmyndugleika er, at ábyrgdin, kortgerðin og raksturin verða savnað á einum stað, so økið kann rekast effektivt, eins og at neyðugar dagføringar framhaldandi verða gjørdar. Umhvørvisstovan hevur drúgvar royndir við at gera kort úr loftmyndum. Í 1985 fekk Matrikulstovan sítt fyrsta kortleggingartól, har kort verða gjørd út loftmyndum, og í hesi 27 árini eru flest øll teknisk grundkort og myndakort framleidd á stovninum. Tí er tað heilt natúrligt, at Umhvørvisstovan verður føroyskur kortmyndugleiki.

Føroyakortið er ikki talgilt, og er í veruleikanum ikki annað enn eitt ótíðarhóskandi pappírskort. Tað er seinast dagført í 1984, men onkrar minni dagføringar eru tó gjørdar síðani. Sostatt kann staðfestast, at føroyakortið er tøkniliga afturúrsilgt, og tørvurin á dagføringum er tí stórur. Aðrir partar av kortleggingaruppgávunum viðvíkjandi Føroyum eru tó munandi betur fyri. Tey seinastu árini hevur Umhvørvisstovan saman við danska Geodatastyrelsen arbeitt við at gera neyvleikan av uppmátingunum í Føroyum betri. Hetta arbeiðið er nú um at verða liðugt, og tá nýggja skipanin verður tikin í brúk, er neyvleikin á staðsettum uppmátingarmerkjum bøttur frá einari óvissu á 10-20 cm til eina óvissu á 1-2 cm.

Skipanin av føroyska kortmyndugleikanum kemur samstundis, sum gongdin í grannalondum okkara er tann, at alsamt fleiri lata kortdata vera tøk og ókeypis hjá øllum at brúka. Fyrsta Norðurlandið, ið gjørdi hetta, var Finland, og tann 1. januar 2013 gjørdust kortdata í Danmark ókeypis. Hetta seinasta árið eru kortdata somuleiðis leysgivin í Íslandi og Noregi. Meginorsøkin til hesa tilgongd er, at politiski myndugleikin vildi seta ferð á digitaliseringstilgongdina í samfelagnum, eins og tað letur fleiri vinnuligar møguleikar upp, tá kortdata eru ókeypis og atkomulig hjá øllum at brúka. Harafturat viðførir leysgevingin av kortdata til ókeypis nýtslu bæði effektiviseringar innan ta almennu umsitingina og møguleikar fyri bæði nýhugsan og nýskapan innan vinnulívið.

Uppskotssetarin heldur tað vera sjálvsagt, at føroysk kortdata verða gjørd ókeypis, samstundis sum ein føroyskur kortmyndugleiki verður skipaður. Í fyrsta umfari ber kortini einans til at gera myndakort ókeypis, tí hesi eru longu til taks. Men tá tað topografiska føroyakortið er dagført og talgilt, skal tað eisini vera ókeypis hjá øllum at brúka. Eins skjótt, sum kortmyndugleikin er skipaður, er ætlanin, at Umhvørvisstovan fer at fyrireika eina tilgongd, sum hevur við sær, at topografisku føroyakortini verða digital og dagførd innan tvey ár.

Almenna partafelagið FDS (Føroya Dátusavn) eigur myndakortini fyri Føroyar, sum Umhvørvisstovan hevur framleitt, eins og tað sonevnda FDS-kortið. FDS er eitt alment partafelag við eigarunum Føroya landsstýri (Umhvørisstovan og Landsverk) 40%, Tórshavnar- og Klaksvíkar kommunur 20%, SEV 20% og Føroya Tele 20%. Felagsskapurin varð í sínari tíð stovnaður orsakað av einum vantandi almennum kortpolitikki. Hann hevur eftir umstøðunum verið eitt vælvirkandi samstarv, nú eingin føroyskur kortmyndugleiki hevur verið.

Sambært galdandi samstarvsavtalu (2010-13) ger Umhvørvisstovan myndakort til FDS, sum hevur ognar- og upphavsrættindini til kortini. Umhvørvisstovan dagførir eisini ávísar partar av tí sonevnda FDS-kortinum, sum FDS hevur ognar- og upphavsrætt til. FDS rindar Umhvørvisstovuni fyri áðurnevnda arbeiði, og kortini síggjast á heimasíðuni kortal.fo.

Sambært hesum lógaruppskotinum verða omanfyristandandi viðurskifti broytt á tann hátt, at øll fáa rætt til at brúka myndakortini, sum Umhvørvisstovan hevur framleitt til FDS, hóast FDS upprunaliga átti upphavsrættin til tey. Hetta metir uppskotssetarin ikki vera nakran trupulleika, tí allir eigararnir av FDS eru almennir stovnar og myndugleikar, sum frameftir fáa stórar fyrimunir av, at myndakortini verða ókeypis. Tí kann ikki koma upp á tal, at veita nakað endurgjald til FDS; tí tað almenna rindar sjálvandi ikki endurgjald til tað almenna. Frameftir skal Umhvørvisstovan sjálv bera allar útreiðslur av loftmyndatøku og framleiðsluni av myndakortum, sum merkir eina árliga netto-meirútreiðlu á umleið 580.000 kr. Verða matrikulskráin og adressuskráin samstundis gjørdar ókeypis, verður tann samlaði inntøkumissurin umleið 970.000 kr., ið sostatt mugu fáast til vega á annan hátt.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

*1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur*

Lógaruppskotið hevur eina røð av fíggjarligum avleiðingum, bæði fyri land, kommunur og fyri vinnuna. Fíggjarligu árinini fyri landið eru negativ, orsakað av, at landið bæði skal bera tann árliga rakstrarkostnaðin av kortmyndugleikanum og dagføringina (digitaliseringina) av føroyakortinum. Árligu rakstrarútreiðslurnar eru mettar til 1,5 mió. kr., meðan dagføringin (digitaliseringin) av føroyakortinum er mett til eina stakútreiðslu á 2,25 mió. kr. Verður dagføringin gjørd yvir tvey ár, verður kostnaðurin av kortmyndugleikanum tey fyrstu tvey árini ávikavist 2,5 og 2,75 mió. kr. fyri síðan at falla til ein árligan kostnað á 1,5 mió. kr.

Um føroyakortið og myndakort av Føroyum verða gjørd atkomulig og ókeypis hjá øllum brúkarum, fær Umhvørvisstovan ein netto-inntøkumiss á umleið 580.000 kr. Henda upphæddin er tí íroknað tí árliga rakstrarkostnaðinum á 1,5 mió. kr., og skal roknast frá tí degi, sum nýtslan av kortunum verður ókeypis.

Meirútreiðslurnar á Umhvørvisstovuni, sum standast av, at kortmyndugleikin verður yvirtikin, og at kortini verða gjørd atkomulig og ókeypis hjá øllum brúkarum, verða spardar aftur aðrastaðni í almennu skipanini. Grundarlag verður ikki longur fyri FDS í verandi líki, og tí fellur ta árliga limagjaldið á 1,5 mió. burtur. Sparingina fáa limirnir í FDS, sum eru Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna, SEV, Føroya Tele, Landsverk og Umhvørvisstovan.

Lógaruppskotið fær sostatt avleiðingar fyri samstarvið í almenna partafelagnum Føroya Dátusavn (FDS), sum ikki longur hevur møguleika fyri at skapa sær vinning burtur úr sølu av teim kortum, sum nú verða ókeypis. Hetta verður kortini ikki mett at vera nakar trupulleiki, tí partaeigararnir í FDS fáa nú allir atgongd til ókeypis kort, og sum áður nevnt spara teir harvið tað árliga limagjaldið til FDS-samstarvið.

Positivu fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum eru fyrst og fremst tær rationaliseringar og avleiddu sparingar, ið standast av, at áðurnevndu kort verða latin til ókeypis nýtslu hjá øllum

áhugaðum. Sostatt verða íløgurnar gjørdar hjá kortmyndugleikanum, meðan rationaliseringarnar og sparingarnar hjá tí almenna skulu finnast aðrastaðni, bæði hjá landi og kommunum.

*2. Umsitingarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur*

Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið, sum fyrst og fremst eru at finna hjá kortmyndugleikanum. Verður Umhvørvisstovan kortmyndugleiki, viðførur hetta eina meirumsiting, sum samsvarar við tvey ársverk. Harafturat koma meiruppgávur, ið eru heftar at kortgerð, loftmyndatøku, geodesi o.ø.t.

*3. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri vinnuna*

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Um føroyakortið, lendismodell og myndakort av Føroyum verða gjørd ókeypis hjá øllum brúkarum, sparir vinnan tær útreiðslurnar, ið eru farnar til keyp av slíkum kortum. Væntandi síggjast sparingarnar aftur hjá byggifyritøkum og øðrum fyritøkum, ið arbeiða við lendisplanlegging. Somuleiðis kann væntast, at sparingar eisini verða hjá ferðavinnuni.

Harumframt kann væntast, at ókeypis kort fara at skapa ein tørv, sum ikki er har í dag – bæði hjá almennum myndugleikum og hjá vinnuni. Hetta er ikki nøkur beinleiðis peningalig sparing, men heldur verður talan um eina virðisøking, ið stendst av nýhugsan og nýskapan innan vinnulívið.

*4. Avleiðingar fyri umhvørvið*

Lógaruppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar við sær.

*5. Serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum*

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

*6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir*

Uppskotið hevur ikki sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

*7. Hava millumtjóða sáttmálar við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.*

Um uppskotið verður samtykt hevur eingin millumtjóða sáttmáli við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfalgsbólkar ella vinnunua.

*8. Áleggur uppskotið fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi, skal verða greitt frá umsitingarligu avleiðingunum av hesum.*

Ongar slíkar skyldur verða álagdar fólki við hesum uppskotinum.

*9. Verða heimildir lagdar til annan landsstýrismann, ella til kommunur umframt kommunustýrislógina, skal greiðast frá teimum fyrilitum, ið grundgeva hetta.*

Við hesum uppskotinum verða ongar heimildir lagdar til annan landsstýrismann ella til kommunur umframt kommunustýrislógina.

*10. Fáa almennir myndugleikar atgongd til privata ogn, skal grundgevast fyri hesum og greiðast frá vavinum av heimildini.*

Lógaruppskotið gevur ongar nýggjar heimildir til atgongd til privata ogn, men staðfestir einans tær verandi atkomuheimildirnar, ið eru neyðugar í sambandi við uppmátingar til kortgerð.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1.** Til tess at beina allan møguligan iva burtur verður ásett beinleiðis í lógini, hvør stovnur er føroyskur kortmyndugleiki.

**Til § 2.** Greinin ásetir, hvørjar uppgávur kortmyndugleikin hevur. Eftir siðvenju fevnir topografiska kortleggingin um tað vanliga føroyakortið, í støddini 1:100.000, tey sonevndu máliborðsbløðini í støddini 1:20.000 og tann føroyska staðanavnadatabasan. Kortmyndugleikin hevur til uppgávu at gera og viðlíkahalda tað almenna føroyakortið og at gera tað tøkt í digitalum sniði innan eitt ávíst tíðarskeið. Harumframt skal kortmyndugleikin gera lendismodell, ið m.a. fevnir um hæddarmodellið av Føroyum. Eisini verður ásett við lóg, at uppgávan við at gera myndakort og standa fyri loftmyndatøku liggur hjá kortmyndugleikanum. Hesa uppgávuna hevur Matrikulstovan (nú Umhvørvisstovan) røkt síðan 1965.

Ásetingarnar í stk. 2 merkja, at kortmyndugleikin skal gera almenna føroyakortið, lendismodellið og myndakortið tøkt á internetinum, so øll áhugað kunnu heinta hesi. Kortmyndugleikin avger sjálvur, hvussu hetta verður gjørt.

Geodesi er læran um støddina og formin á jørðini, sum m.a. leggur fast tað geografiska referensunetið, ið er sjálvt grundarlagið undir øllum uppmátingum. Sostatt hevur geodesi'in alstóran týdning, bæði fyri uppmátingar á sjógvi og á landi. Kortmyndugleikin hevur ábyrgdina av føroyska geodetiska grundarlagnum og fær við ásetingunum í stk. 3 eisini heimild til at fremja geodetiska gransking.

Stk. 4 heimilar landsstýrismanninum at leggja aðrar kortleggingaruppgávur til kortmyndugleikan við kunngerð. Slíkar uppgávur kunnu vera sjókort, teknisk kortlegging av ymiskum slag o.a.t.

**Til § 3.** Greinin hevur til endamáls at áseta, at kortmyndugleikin skrásetur tær staðsettu upplýsingar, sum aðrar fyriskipanir áleggja honum. Fastar fyriskipanir eru fyri góðkenning av staðanøvnum ígjøgnum staðanavnanevndina, og kortmyndugleikin hevur til uppgávu at staðseta hesi. Tó er avmarkað, hvussu nógv staðanøvn skulu við á kortini, og tí er kortmyndugleikin heimilaður at avmarka mongdina. Sostatt kann eitt staðanavn væl vera við í staðanavnadatabasanum uttan at standa á tí almenna føroyakortinum.

Afturat staðanøvnunum skal kortmyndugleikin skráseta ávís fyrisitingarlig mørk, nevniliga kommunumark og hagamark. Somuleiðis skulu tær gomlu bygdagøturnar – varðagøturnar skrásetast til tess, at almenningurin kann síggja, hvar í haganum tað er møguligt at ferðast uttan loyvi frá eigarunum. Og eigararnir í høgunum fáa á sama hátt upplýst, hvar teir ikki hava loyvi til at forða almennari ferðslu.

Verður tað í øðrum fyriskipanum álagt kortmyndugleikanum at skráseta aðrar upplýsingar, t.d. lendisskipanir, býlisskráir o.a.t., so staðfestir greinin hesar skyldur.

**Til § 4.** Ásetingin gevur kortmyndugleikanum somu heimild sum matrikulmyndugleikin hevur sambært § 42 í matrikullógini (ll 64/1962). Tann sama heimildin er eisini í § 6 í núgaldandi donsku lóggávuni um kortmyndugleika (lbk nr. 1210/2013).

**Til § 5** Ásett verður, at tað vanliga føroyakortið og sonevndu máliborðsbløðini skulu vera atkomulig hjá almenninginum. Í praksis verður hetta gjørt við, at kortdatabasan verður atkomulig á internetinum, eins og møguligt verður at heinta digitalu kortini ókeypis. Tað sama er galdandi fyri myndakortini, sum Umhvørvisstovan higartil hevur framleitt til Føroya Dátusavn. Fyri onnur kort enn hesi, sum kortmyndugleikin framleiðir, verður ein gjaldsheimild ásett. Gjaldið má tó ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í samband við ta ítøkiligu tænastuna ella veitingina, sum ikki. Kortmyndugleikin hevur harafturat skyldu til at lata tað vanliga føroyakortið, í støddini 1:100.000, prenta og lata tað vera til taks fyri vanligari smásølu. Kortmyndugleikin hevur sostatt heimild til at taka pening fyri tað prentaða føroyakortið, sum samsvarar við framleiðslukostnaðin

**Til § 6** Gildiskomuáseting. Orsakað av, at málsøkið verður yvirtikið, verður heimild til at seta ta gomlu donsku lógina frá 1928 úr gildi. Í tveimum førum, í 1999 og 2002, hava danskir myndugleikar spurt føroyskar myndugleikar um, hvørt nýggjari donsk lóggáva (lov nr. 749/1988) skuldi setast í gildi í Føroyum. Í báðum førum hevur landsstýrið tó sagt nei, og tí hevur tann gamla danska lógin frá 1928 framhaldandi verið galdandi.

**Á Løgtingi, 7. mars 2016**

Jacob Vestergaard